# ítróttur

Nr. 74 • týsdagur • 20. apríl 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


Heðin Mortensen, ÍSF-forseti

## Sera harmiligt fyri føroyskan ítrótt

**Forsetin í ítróttarsambandinum, Heðin Mortensen, harmast um, at Føroya Landsstýri hevur avgjørt, at útlendsk ítróttarfólk fyrst og fremst skulu verða lønt av feløgunum, um tey ætla sær hendan vegin**



*ÍSF-forsetin Heðin Mortensen heldur tað verða ógvuliga harmiligt fyri føroyskan ítrótt, at landsstýrið nú setur eina forðing fyri útlendskum ítróttafólki*

*Savnsmynd*


ÚTLENDINGAMÁLIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Tað kom ógvuliga óvart á Heðin Mortensen, at hann í tíðindunum í útvarpinum sunnudagin á miðdegi frætti, at landsstýrið hevði tikið undir við ætlanini hjá landsstýrismanninum í innlendismálum um at útlendingar, ið føroysk ítróttarfeløg ætla at fáa sær hendan vegin, skulu verða løntir av feløgunum sjálvum. Heðin Mortensen sigur, at hann í tað minsta hevði væntað, at ÍSF bleiv kunnað um avgerðina hjá landsstýrinum, áðrenn farið var í fjølmiðlarnar. ÍSF-forsetin sigur seg verða sera harman um, at løgmaður, ið er verji hjá føroyska ítróttinum, ikki hevur lurtað eftir ítróttarsambandinum.

### Fer at avtofta fleiri bygdarfeløg

Heðin Mortensen sigur, at hetta fer allarhelst at avtofta fleiri bygdarfeløg. Hann sigur, at nógv av hesum útlendsku ítróttarfólkunum eisini eru ungdómsvenjarar í feløgunum, og at tað verður ógvuliga trupult hjá teimum smærru bygdarfeløgunum at útvega nýggjar og eins góðar ungdómsvenjarar, sum fleiri av útlendingunum hava verið. Avgerðin hjá landsstýrinum fer fyrst og fremst at raka smærru bygdarfeløgini, sigur Heðin Mortensen og leggur afturat, at hetta fer beinleiðis at gera smærru feløgini veikari og stóru feløgini sterkari, og tískil verður munurin bara størri og størri millum topp og botn í teimum ymisku ítróttargreinunum.

Somuleiðis undrast forsetin í ÍSF á, at nú landsstýrið hevur avgjørt, at útlendingarnir skulu fáa minst 60 prosent av sínari løn frá feløgunum, at tað ikki verða játtaðir pengar frá landsstýrinum til feløgini, tí annars ber tað als ikki til. Við hesari avgerð hevur landsstýrið avgjørt, at ítrótturin í Føroyum skal verða professionellur, men teir lata ongar pengar við, sigur, Heðin Mortensen. Hann sigur eisini, at tað er løgið, at so nógv orka verður brúkt upp á eitt mál, sum tilsamans snýr seg um í mesta lagi 70 fólk, sum bert eru her nakrar fáar mánaðir hvørt ár.

Sambært ÍSF-forsetanum eru tað hvørt ár eitt stað millum 60 og 70 útlendsk ítróttarfólk her á landi, 30 um summarið, og nøkur fáa fleiri um veturin. Hetta er ein ótrúliga lítil partur av samlaðu mongdini av ítróttarfólki her á landi, ið er okkurt um 15.000, sigur Heðin Mortensen. Vit skulu eisini hava í huga, at hesir útlendingar hava hækkað støðið í nógvum føroyskum ítróttargreinum munandi, sigur hann.

### Fáa ikki arbeiði aðrastaðnis

Við tað at ítróttarfólkini ikki kunnu forvinna meiri enn í mesta lagi 40 prosent av sínari løn uttan fyri feløgini, verður tað øgiliga trupult hjá teimum at finna eitt arbeiðspláss, ið kann ganga teirra ynskjum á møti, sigur Heðin Mortensen. Hann heldur eisini, at tað er púrasta burturvið at siga, at útlendsku ítróttarfólkini hava tikið arbeiði frá føroyingum. Somuleiðis sigur hann, at skuldi tað veruliga blivið arbeiðsloysi her á landi, sum hann sjálvsagt ikki vónar, so steðgar tilgongdin av útlendskum ítróttarfólki upp av sær sjálvum, tí feløgini fáa ikki arbeiði til tey, heldur Heðin Mortensen. Um nú ein útlendskur ítróttarmaður leitar sær hendan vegin, fær familjan hjá honum, t.v.s. kona og børn, ikki loyvi at koma við uttan víðari, og tað heldur Heðin Mortensen verða ótrúliga harmiligt fyri Føroyar sum tjóð.

### Fer at vekja ans í altjóða ítróttarheiminum

Umstrídda avgerðin hjá landsstýrinum fer uttan iva at vekja ans millum fólk í altjóðari ítrótt, sigur Heðin Mortensen, og hann væntar, at ÍSF fer at hoyra nógv fyri hetta á millumtjóða ráðstevnum og fundum. Slíkt ryktast skjótt í ítróttarheiminum, og Heðin Mortensen stúrir fyri, at hetta fer at ávirka umdømi hjá Føroyum sum ítróttartjóð.

Í ÍSF hava tey enn ikki gjørt nakra niðurstøðu um, hvat tey fara at gera víðari í málinum, men Heðin Mortensen sigur, at málið verður ikki slept her. ÍSF fer í næstum at hava stjórnarfund, og tá verður málið umrøtt, og væntandi fer leiðslan í ISF í næstum at seta seg í samband við fleiri av lokalfeløgunum fyri at hoyra, hvussu hetta ávirkar tey í teirra gerandisdegi.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður:

## ÍSF hevur verið við í viðgerðini

**Løgmaður sigur tað verða ósatt, tá ið Heðin Mortensen sigur, at ÍSF ikki hevur verið hoyrt í viðgerðini av útlendingamálinum**



*Løgmaður avsannar at ÍSF ikki hevur verið við í viðgerðini av útlendingamálinum*

*Savnsmynd*


ÚTLENDINGAMÁLIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Í greinini oman fyri sigur ÍSF-forsetin, Heðin Mortensen, at ítróttarsambandið als ikki er hoyrt í útlendingamálinum, men hetta avvísir løgmaður. Jóannes Eidesgaard sigur, at ÍSF hevur verið á fundi við landsstýrismannin í innlendismálum, og harafturat hevur leiðslan í ítróttarsambandinum umrøtt málið á fundi við løgmann.

### Skilir væl støðuna hjá ÍSF

Løgmaður sigur seg tó væl skilja støðuna hjá ÍSF, men hann sigur, at landsstýrið noyðist at røkja áhugamálini hjá øllum partum, og so royna at finna ein gyltan millumveg. Jóannes Eidesgaard sigur, at ein mótpartur eru arbeiðarafeløgini kring landið, og tey vilja sjálvsagt ikki hava, at útlendingar koma hagar og taka arbeiði frá limunum hjá sær.

Vit skulu royna at finna eina kós, sum allir partar kunnu liva við, sigur Jóannes Eidesgaard, og tað meta vit, at vit nú hava gjørt við tí uppskotinum, sum vit hava sent donsku myndugleikunum til viðgerðar.

Jóannes Eidesgaard sigur seg væl skilja, at útlendingarnir hava stóran týdning í nógvum feløgum, og hann sigur seg verða samdan í, at útlendingarnir hava hækkað støðið í eitt nú hondbóltinum og flogbóltinum her á landi.

### Trupult mál

Talan er um eitt ógvuliga trupult mál, tí útlendingalóggávan er ein lóg, sum forðar og ikki letur upp, sigur løgmaður. Hann sigur, at sambært lógini skulu tað verða heilt serlig viðurskifti, ið tala fyri, at ein útlendingur fær arbeiðs- og uppihaldsloyvi her á landi, og hon nevnir als ikki ítróttarfólk, sigur Jóannes Eidesgaard. Tað hevur bara verið siðvenja, at tey hava fingið arbeiðs- og uppihaldsloyvi, sigur løgmaður, men hetta er ein trupulleiki við tí vaksandi arbeiðsloysinum.

Jóannes Eidesgaard sigur, at hann hevur fingið eina formella klagu frá ÍSF, og hana fer hann sjálvsagt at svara upp á og greiða frá málinum, soleiðis sum landsstýrið sær tað.



## Bygdalið aftur partur av finaluni



Tað vóru Bjarki Mohr og Pætur Clementsen sum vegna FSF vóru í Útvarpinum sunnudagin, tá lutur varð kastaður um, hvussu spælast skal víðari í steypakappingini

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Útvarp Føroya*

**Lutakastið lagaði tað soleiðis, at B36 og HB heldur ikki hesa ferð hava møguleika á Ólavsøku at takst í steypafinaluni, har havnarfeløgini ikki hava spælt ímóti hvørjum øðrum síðani í 1991**


LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*


Tað er ein dreymur hjá fótbóltshugaðum havnarfólkum, sum sjáldan er veruleiki. Ivaleyst fer hann eina ferð aftur at gerast veruleiki. Sunnudagin varð tað greitt, at tað verður ikki í ár, men tað ber til at halda fram við at droyma og vóna, at tað kanska fer at verða næsta ár!

Tað er steypafinaluna og lutakastið fyri restina av hesum steypaárinum, sum hetta snýr seg um. Í 1991 vann B36 steypafinaluna ímóti grannunum. Úrslitið var 1–0. Málskjútti ta ferðina var Bergur Magnussen. Síðani hava HB og B36 ikki staðið yvir av hvørjum øðrum í steypafinaluni.

Tað eru fýra ár síðani, at fyrsta finalan varð spæld á Tórsvølli, og tað eru trý ár síðani, at fyrsta finalan var á Ólavsøku. Síðani hesar broytingarnar hava viðhaldsfólk hjá havnarfeløgunum tosað um møguleikan fyri rættari havnaruppgerð á Tórsvølli á Ólavsøku, men tað tykist ganga striltið at fáa eina sovorna í lag.

### Langt er ímillum

Grannauppgerðirnar í høvuðsstaðnum eru ótættar í steypafinaluni. HB hevur vunnið steypakappingina 25 ferðir, og B36 hevur vunnið hana fýra ferðir. B36 hevur tvær ferðir vunnið ímóti HB. Fyrri sigurin var 26 ár frammanundan sigrinum í 1991. 19. september í 1965 spældu B36 og HB fyrstu finaluna um fyrstu Ísafjarðarsúluna. B36 vann 3–2, eftir at hálvleiksstøðan hevði verið 2–0. Baldvin Baldvinsson legði B36 framum við brotssparki, og Hugin Samuelsen økti til hálvleiksstøðuna. Eftir steðgin skoraði Kári Helmsdal tvey mál fyri HB, áðrenn Baldvin Baldvinsson skoraði sigursmálið fyri B36.

Síðsta ferðin, at HB vann steypafinalu ímóti B36, var í 1972. 24. september var sjeynda finalan um fyrstu Ísafjarðarsúluna spæld í Gundadali. HB vann 6–1. Aftur hesa ferð var Baldvin Baldvinsson málskjútti fyri B36. John Eysturoy skoraði tvey mál fyri HB, og hini skoraðu Eyðfinn Lamhauge, Manne Persson, Eirikur Rasmussen og Finnur Helmsdal.

Í 1964 spældu B36 og HB eina tað mest tiltiknu steypafinaluna av øllum. Í síðstu finaluni um Ísafjarðarbikarið, sum tað varð spælt um 1955–1964, varð spælt á Tvøroyri, har HB leygardagin 5. september vann á TB, og sunnudagin 6. september spældi HB finalu ímóti B36. Tað endaði javnt. So varð spælt umaftur og umaftur, uttan at úrslitið gjørdist øðrvísi. 12. september var nýggjur dystur í Gundadali. Tá endaði tað aftur við javnleiki. Síðani varð spælt, inntil annað liðið fekk mál, og tað varð HB, sum vann bikarið fyri sættu ferð. Harvið vann HB bikarið til ognar.

### Eysturoy ella Klaksvík

Sunnukvøldið varð í ítróttartíðindunum hjá útvarpinum lutur drigin um, hvussu liðini skulu hittast í fjórðingsfinaluni og hálvfinalunum. Tá varð greitt, at B36 og HB hava møguleika fyri í hálvfinaluni at spæla um annað finaluplássið, og at hin finalisturin fer at verða funnin í kapping millum trý feløg í Eysturoy og KÍ.

Undan lutakastinum var greitt, at tey fýra feløgini, sum skulu eiga heimavøll í fjórðsingsfinaluni, eru B36, ÍF, GÍ og HB. Mótstøðuliðið hjá steypavinnarunum úr B36 verður VB. Mótstøðuliðið hjá ÍF verður KÍ. Mótstøðuliðið hjá GÍ verður NSÍ, og EB/Streymur skal í Gundadal at spæla ímóti HB.

Umframt í sjálvari finaluni er tað bara í fjórðingsfinaluni, at vinnarin verður funnin í einum og sama dysti. Fjórðingsfinalurnar eru ásettar at vera leygardagin 8. mai ella leygardagin eftir at annað umfarið í landskappingini er spælt 2. mai.

Tvær fjórðingsfinalur skulu spælast í Gundadali. Tað er greitt, at B36 og HB ikki fara at spæla fjórðingsfinalu í senn, men tað er ikki greitt, um havnarfeløgini fara at spæla sama dag, ella um onnur verður leygardag og hin sunnudag. Ein annar møguleiki er, at onnur verður fríggjadagin 7. mai, sum er Dýri biðjudagur.

Lutakastið til hálvfinaluna staðfesti, at B36 og HB ikki fara at stríðast í finaluni á Ólavsøku. Vinnarin av dystinum millum B36 og VB skal spæla ímóti vinnaranum millum HB og EB/-Streym, og vinnarin av grannauppgerðini millum GÍ og NSÍ skal spæla um annað finaluplássið ímóti vinnaranum av stríðnum millum ÍF og KÍ. Harvið er tað greitt, at Eysturoyggin ella KÍ fer at eiga annað finaluplássið, og at kappingin um hitt finaluplássið fer at standa millum Havnina, Vág og Sundalagið.

Fyrra hálvfinalan verður sunnudagin 23. mai, og tann seinna verður leygardagin 3. juli.


